


## Jens á Lava:

# Var ein rættiligur fiskimaður

**Ofta verður glósað við "kraddingina" hjá Lavamonnum. Men teir høvdu eginleikar, sum høvdu sloppið okkum undan mongum kreppum**



**Óli Jacobsen**
olij@sosialurin.fo

Jens Ludvig Olsen, kallaður Jens á Lava, var føddur 23/3-1885. Hann var giftur við Johannu Henriksen av Dalinum í Klaksvík, fødd tann 9/12-1885. Hon doyði bert 28 ára gomul tann 26/10-1913.

### Lavamenn vóru sjómenn

Jens á Lava gjørdist sjómaður burturav eins og brøðurnir Johan, kallaður Hanne, og Palli á Lava. Hann sigldi í 1903-1905 við skipinum "Oliviu", sum bróðurin Hanni førdi. Jens tók skiparaprógv í 1905, og hann var í 1906-1908 bestimaður saman við Jens Jákupi Haraldsen á Tórmannsbakka í Miðvági við "Tre søskende" við bróðirnum Hanna sum skipara.

Í 1909 var Jens við "Saltaire", sum Hanne eisini førdi. Hann fór í 1910 at føra "Galateu" sum Jens Evensen átti. Hanne førdi hana fram til 1913. Árini 1916-1918 var Jens við "W. G. Marshall", sum bróðurin Palli førdi, og í 1919 var hann við "C.&M. Slater", sum systkinabarnið Hans Hansen í Funningsstovu førdi og átti saman við Carl á Lað. Jens førdi so "C.& M.Slater" í 1920 og 1921. Bestimaður hjá honum var Niclas Pauli Hansen úr Havn, sum seinni í mong ár kom at sigla við gamla "Róki" hjá Skipafelagnum millum bygdir í Føroyum.

Á heysti 1921 var Jens bestimaður við "George Morfin" til Leith við fiski og var Andras Joensen úr Vík skipari. Heystið 1922 var hann bestimaður við "Saltaire" við skiparanum Johannes Joensen. Hann var ættaður av Syðradali, men búsettist seinni Yviri við Strond í Havn.

wJens var í fleiri ár flekjari við enskum trolarum saman við systkinabarninum Rasmus Hansen úr Funningstovu. Hetta var vanligt tá. Í Miðvikuni hava vit greitt frá, tá ið Albert í Horni eisini var við enskum trolarum og breyt beinið.

Í 1929 førdi Jens sluppina "Thurid" hjá felagnum Nabb, sum Zacharias Heinesen reiddi út. Í 1931-1938 fór hann at føra "Álkuna" sum Skipafelagið átti og nýtti til innanoyggja farmasigling.

Seinnu árini starvaðist Jens sum loðsur og kunnigur maður við fleiri útlendskum skipum. Eitt dømi er danska havrannsóknarskipið "Dana", tá ið hetta skip gjørdi ymiskar kanningar undir Føroyum.

Johan Restorff Jacobsen minnast Jens frá tíðini, hann var vanur at avloysa Wilhelm Reinert, ættaður úr Kaldbak, sum var skipari á tí gomlu "Rituni" í strandfarasigling. Johan plagdi eisini sjálvur at biðja hann við.

Á 75 ára føðingardegi sínum 23/3-1960 gjørdist Jens heiðurslimur í Føroya Skipara og Navigatørferlag.

### Bótin sum lønti seg

Jens var skemtiligur og áhugaverdur at lurta eftir og hevði altíð okkurt at fortelja ella siga teimum, sum yngru vóru. Jens og Johanna áttu sonin Jákup Olsen á Lava nevndur "Addi". Hann giftist við danskari konu Esther og búsettist í Danmark, men tey fingu einki barn. Hann doyði í 1986 og urnan er sett í grøvina hjá foreldrunum.

Jens bygdi sær hús í Jónas Broncksgøtu, har kioskin Aktiv er í dag, men tá konan doyði, seldi hann hesi hús. Hann búði so á Lava hjá móðurini Elsebu úr Funningsstovu, tá hann var heima. Seinni bygdi hann sær eini lítil hús á eina grund, sum Evensen áður hevði átt og nýtt til íshús millum Lavahúsini og húsini, sum Hjalmar hjá Gutta Jens átti í Kielerkanaluni. Systurdóttur hansara Jutta, ið giftist við bankastjóranum Rasmussi Olsen, dóttur bróðir hansara Andreas á Lava, helt hús hjá honum.

Jens visti væl, at øki var ovlítið til at byggja á, og at hann ikki kundi fáa nakað byggiloyvi. Hann bygdi kortini har, meðan fútin, ið skuldi geva nevnda byggiloyvi, var í summarfrí í Danmark. Tá ið fútin kom aftur, fekk Jens eina minni bót fyri ólóligu byggingina, men tað tók Jens sær ikki tikni av. Hann rindaði fegin tær fáu krónurnar sum bótin var.

Jens átti eina trøð saman við bróðursoninum Olafi á Lava. Hann var ikki smáligur, tá ið tað galt at hjálpa øðrum. Einaferð hjálpti hann manni, ið átti nógv børn at keypa sær eina kúgv.

Eisini hjálpti hann onkrum við peningi. Hesin setti jørð sína í veð. Tá ið viðkomandi ikki kundi rinda peningin aftur, kom Jens at eiga jørðina. Viðkomandi kom kortini at hava hana um hendi, og hann keypti hana aftur seinni.

Jens á Lava doyði 86 ára gamal tann 4/6-1971 og er jarðaður í gamla kirkjugarði undir Svínaryggi saman við konuni.

### Smáligir við skili

Tað hevur onkuntíð verið tikið til, at Lava mennirnir vóru smáligir. Teir hildu fast um hvørja krónu, teir áttu, og skuldu ikki unna sær sjálvum og øðrum nakað. Havnarmenn tóku sum dømi, at teir kendu Lavabátin langt burtur, tá hann kom aftur av útróðri av tí, at teir ongantíð kundu síggja nakran fugl aftaná bátinum, sum við øðrum bátum, sum blakaðu slógvið út, tá teir kruvdu. Lavamenninir tóku slógvið heim við sær. Tað var so borið niðan á traðirnar til at grava undir fyri at fáa betri grasvøkstur.

Veruleikin var tann, at Lavamenn vóru vandir við smá kor. Teir máttu liva í sparsemi. Onki mátti fara fyri skeyti ella til spillis. Tað var umráðandi altíð at svara hvørjum sítt og ongantíð skylda nøkrum manni nakað. Hetta settu teir eina æru í, samstundis sum teir vóru arbeiðssamir og ikki untu sær sjálvum nakra hvíld.

Teir høvdu ein langan og strævnan arbeiðisdag á traðunum, soleiðis at teir kundu dyrka grýtut hagalendi til grønar fløtur við vøkrum laðaðum grótgørðum rundan um. Teir eru satt prýði fyri Havnina. Teir høvdu ein langan arbeiðisdag bæði á vetri og sumri. Um várarnar, summarið og heysti á skipsdekki, og um veturin á útróðri og á traðunum.

Hetta kundu nógv lært av í dag.

*Kelda: Johan Restorff Jacobsen*



*HER HVILER*
*JOHANNE OLSEN*
*FØDT HENRIKSEN*

*F. 9. DECEMBER 1885*
*I KLAKSVIG*
*D. 26. OKTOBER 1913*
*ELSKET OG SAVNET*

*JENS OLSEN*
*Á LAVA*
*F. 23. MARTS 1885*
*I THORSHAVN*
*D. 4. JUNI 1971*

*JACOB*
*F. 10.7. 1912 D.*
*17.12.1986*



*Jens Olsen á Lava*



*Kongabrúgvin har Lavamennirnir høvdu sína dagligu gongd*



*Jutta hjá Dia á Lava sum helt hús fyri Jens*



*Á Lava, barnaheimið hjá Jens*



**Næstu ferð**
Komandi partur verður um Niels L. Holm. Hann noktaði gamla Sloan at gera tað dópskar, sum hann seinni sjálvur fór í